FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-125_1.3
dags. 01-02-2011

Mentamálaráðið
Att: Hildur Patursson

hildur mmr.fo

Viðv. Námsfrøðilig stevnumið fyri dagstovnar (uppskot til hoyringar)
Felagið hevur móttikið uppskot tygara 07-12-2011. Uppskotið er viðgjørt í stýrisbólkinum "Mentan og skúli" og á stýrisfundi 14-01-2011.

Tilmæli
Felagið metir tað ikki vera rætt, at viðgera uppskot til námsfrøðilig stevnumið fyri dagstovnar, fyrr enn MMR og kommunurnar hava viðgjørt onnur viðurskifti á dagstovna- og dagrøktarøkinum.

Felagið mælir somuleiðis til, at eitt nýtt uppskot verður gjørt, sum savnað eigur at fevna um námsfrøðilig stevnumið, starvsfólkasamanseting og virksemi á dagstovnum og dagrøktum.

Harumframt eigur uppskotið at taka støði í verandi umstøðum á dagstovnaøkinum.

Viðmerkingar til fyriliggjandi uppskot
Felagið hevur valt ikki at viðgera uppskotið í smálutum, bæði tí talan er um námsfrøðiligt innihald, sum vit bert hava avmarkaðan førleika at viðgera, og tí at felagið ikki metir, at uppskotið er búgvið til veruliga viðgerð.

Uppskotið vísir m.a. til § 3, stk. 3 í dagstovnalógini: "Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um námsfrøðiliga stevnumiðið, starvsfólkasamanseting og virksemið á dagstovnum og dagrøktum." Vit halda ikki, at tað er rætt at gera uppskot til námsfrøðiliga stevnumiðið og ikki – ella í hvussu so er í sera lítlan mun – starvsfólkasamansetingina og virksemið á dagstovnum og dagrøktum. Eftir okkara tykki eigur eitt uppskot at fevna um øll trý økini, tí at ásetingar á einum øki ávirka hini.

Vit halda eisini, at uppskotið í alt ov lítlan mun tekur støði í umstøðunum á dagstovna- og barnaansingarøkinum í løtuni. Uppskotið tykist í alt ov lítlan mun at taka atlit til, at kommunurnar í stóran mun hava ábyrgdina av dagstovnaøkinum. Fleiri kommunur hava vístá, at tær eru ónøgdar við leiðsluviðurskiftini á dagstovnaøkinum, og at tær vilja hava hesi viðurskifti broytt, soleiðis at dagstovnaleiðsla kann leiða fleiri dagstovnar. Henda hugsan er í samsvari við ætlanunum hjá MMR á skúlaøkinum, har mælt verður til skúlaøki. Kommunufeløgini hava biðið um fund við MMR um hesi viðurskifti.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

Vit halda, at vandi er fyri, um uppskotið verður sett í verk, at kommunurnar antin beinleiðis ella óbeinleiðis kunnu fáa meirútreiðslur á dagstovnaøkinum. Í fyrsta lagi, tí uppskotið mælir til, at námsfrøðingar og serliga dagstovnaleiðarar fáa nógvar uppgávur, sum tey ikki hava í dag. Neyðugt kann tí vera við nógv meiri tíð til fyrireiking og t.d. skeið. Havast má eisini í huga, at uppskotið onki nevnir um umsitingarligu uppgávurnar hjá dagstovnaleiðarunum, fleiri kommunur hava víst á, at hesar uppgávur ofta eru niðurraðfestar, og at dagstovnaleiðararnir ikki nýta nóg nógva orku til at betra hesar førleikar. Um dagstovnaleiðslurnar fáa enn fleiri námsfrøðiligar uppgávur, so er vandi fyri, at enn fleiri umsitingarligar uppgávur verða fluttar til onnur at loysa.

Uppskotið kann eisini hava við sær øktar útreiðslur av barnagørðunum og umhvørvinum uttanum – sí "9. Pedagogiska umhvørvið", har verða m.a. høli, innrætting og spælipláss umrødd.

Vit halda, at uppskotið í ov stóran mun tekur ábyrgdina frá foreldrunum og letur dagstovninum uppgávuna at uppala børnini. Vit ivast í, um foreldur taka undir við hesum, og at øll foreldur taka undir við tí virðisgrundarlagi, sum uppskotið lýsir.

Eftir okkara tykki, fer uppskotið ov langt inn á økið hjá fólkaskúlanum. Vit halda, at semja má vera um, nær og hvussu undirvísing skal vera. Á s. 19 stendur: "Tað árið, barnið fyllir seks ár og skal í skúla, eiga námsfrøðingar í samstarvi við børnini at skipa fyri serligum møguleikum og avbjóðingum fyri at virka í bólkum. Hetta er ein liður í teirra yvirgongd úr barnagarði til fólkaskúla og frítíðarskúla." Onki verður nevnt um samstarv við fólkaskúlan/lærararnar. Seinni á somu síðu stendur tó: "Starvsfólk í barnagarði, frítíðarskúla og fólkaskúla skulu samstarva og kunna hvønn annan um hugsjónarligt innihald og starvshættir hjá hvørjum øðrum.", men onki stendur um, hvussu hetta samstarv skal skipast.

Vit ivast í, um verandi námsfrøðingar eru førir fyri at fremja tær hugsanir, sum uppskotið mælir til. T.d. stendur á s. 5: "Virðingin fyri burðardyggari menning, bæði mentanarliga, sosialt, búskaparliga og umhvørvisliga, skal stuðlast, og umráðandi er at geva børnunum eina bjarta vón á framtíðina og vísa á, at í felagsskapi ber til at ávirka framtíðina."; á s. 14 stendur, at børnini skulu hava so nógvar og fjølbroyttar møguleikar til at: "... taka lut í umrøðum um ymiskar heimspekiligar spurningar og síggja fjølbroyttar møguleikar og loysnir."

Kanska verður neyðugt at uppstiga námsfrøðingaútbúgvingina munandi, hjálpar-fólkini, sum jú eru tann størsti starvsbólkurin á dagstovnaøkinum, kunnu neyvan arbeiða á dagstovnunum í framtíðini. Ivasamt er eisini, um tað er ráðiligt at geva foreldrum møguleika at ansa sínum egnu børnum.

Fyrireikingarbólkurin heldur, at tað er sera løgið, at uppskotið er sent dagstovnaleiðarum og dagrøktarleiðarum til hoyringar. Vit halda ikki, at tað er rætt, at kommunal starvsfólk verða nýtt sum hoyringspartur – tey nýta helst sína vanligu arbeiðstíð til hesa uppgávu - uttan at arbeiðsgevarin hevur havt møguleika at góð-kenna hetta. Um MMR vildi hava fakfólk at umrøða uppskotið, so kundi MMR sjálvt sett dagstovnaleiðarar í arbeiðsbólk.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

FØROYA KOMMUNUFELAG

Vit halda eisini, at MMR og kommunurnar fyrst skuldu viðgjørt uppskotið og onnur viðurskifti á dagstovnaøkinum, áðrenn aðrir partar viðgera uppskotið. Vandi er jú fyri, at kommunurnar mæla frá at taka undir við uppskotinum, og tá er óheppið, um kommunal starvsfólk mæla til.

fyri felagið

Asbjørn Djurhuus, formaður

Bergmann Finnsson, ráðgevi.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo